Flogbóltsskipanin komin

Flogbóltsleikarar kring landið fáa í næstum kappingarskipanina fyri komandi veturin sendandi frá Flogbóltssambandinum

FLOGBÓLTUR
Jákup Mørk

Flogbóltslandskappingin er farin ígongd, og hetta merkir so sjálvandi eisini, at kappingarskipanin hjá FBF er komin í umfer kring landið.

Sum vant eru tað fyrst og fremst upplýsingarnir í hesari, sum eru áhugaverdar, og sum vanligt hevur Flogbóltssambandið gjørt nógv burturúr, soleiðis at lætt skal vera at fáa fatur á ymsu upplýsingunum.

Ikki minst er tað í hesum sambandi hent, at hava trý yvirlit til skipan av kappingini. Eitt dagayvirli, sum sýnir, hvørjir dystir verða leiktir í ymsu deildunum dag fyri dag. Eitt hallaryvirlit, sum sýnir dystirnar í ymsu ítróttarhallunum, og so sjálvandi vanliga skipanin, har dystirnir eru settir eftir deildunum. Harumframt er eisini høgligt, at ferða-ætlanin hjá Strandferðsluni er prentað í skipanini.

Nógv at frøast um

Í fororðunum til skipanini staðfestir nevndin hjá FBF, at seinnu árini hava borið nógv positivt til føroyskan flogbólt.

Ikki minst verður fegnast um stóru tilgongdina av ungum leikarum, sum flogbólturin hevur havt seinnu árini, eins og staðfest verður, at tað hevur økt um spenningin í bestu deildunum, at fleiri av feløgunum – millum annað bæði meistaraliðini í fjør – hava fingið sær leikandi útlendskar venjarar. Eisini gleðist nevndin um undirtøkuna, sum steypafinalurnar hava fingið. Bæði millum leikarar og fjølmiðlar.

Gudrið Nolsøe í dysti fyri kvinnulandsliðið á Oyggjaleikunum prýðir permuna á kappingarskipanini fyri flogbóltin hetta kappingarárið

Tað, sum helst var hæddarpunktið á árinum í fjør, var uttan iva Oyggjaleikirnir á Man, har føroysku kvinnurnar enn eina ferð gjørdu bart, og tað er eisini ein mynd frá einum av kvinnudystunum, sum prýðir permuna á skipanini.

Tað er Hestprent, sum hevur staðið fyri umbrótanini og prentingini av skipanini, sum í hesum døgum verður send øllum feløgunum kring landið.

Badminton á Kambsdali

Um vikuskiftið skipaði ÍF fyri Daewoo-open kappingini í badminton. Hetta er kapping hjá yngru deildunum

BADMINTON
Jákup Mørk

Um vikuskiftið var skipað fyri badmintonkapping fyri yngru deildirnar á Kambsdali.

Tað var ÍF, sum skipaði fyri kappingini, ið nevndist Daewoo-open.

Hópur av luttakarum høvdu boðað frá luttøku, og eftir at hava sjøtul varð settur á um døgurðatíð leygardagin, var spælt at kalla út í eitt, til vinnararnir í ymsu bólkunum vórðu funnir sunnudagin.

Niðanfyri prentað vit nøvnini á teimum trimum, sum endaðu ovast í ymsu deildunum.

U-11, dreingir
1 Fríði Lamhauge HBF
2 Magnus á Rógvu VÍF
3 Ari Ellingsgaard ÍF

U-11, gentur
1 Konni Kass Jacobsen HBF
2 Agnas Olsen VÍF
3 Fjóla Luid HBF

U-13, dreingir
1 Filip Gram MBF
2 Sigurd D. Carlsson HBF
3 Jan Ellingsgaard ÍF

U-13,. gentur
1 Cecilie Cedergren Sæby, DK
2 Brynhild Carlsen HBF
3 Óluvá Bærentsen ÍF

U-15, dreingir
1 Niclas Eysturoy HBF
2 Jan N. Poulsen ÍF
3 Rógvi Poulsen HBF

U-15, gentur
1 Julie Skovgaard Sæby, DK
2 Ulla í Dávastovu VÍF
3 Rannvá á Rógvu VÍF

U-18, gentur/dreingir (kappaðust saman)
1 Tummas Rubeksen HBF
2 Sverri Ellingsgaard ÍF
3 Høgni Madsen ÍF

Longu á døgurða leygardagin varð byrjað at kappast, og so varð ikki helmað í, fyrr enn vinnararnir vórðu funnir sunnudagin

Mynd: Álvur Haraldsen

Meistarar á heimavølli

Fýra hondbóltsdystir í fremstu deildunum eru á skránni mikukvøldið

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Bæði meistaraliðini hjá VÍF fara í kvøld, mikukvøldið, undir fyrsta heimadystin hetta kappingarárið, og í báðum førum verður mótstøðuliðið StÍF.

Eru favorittar

Lagt verður fyri við kvinnudystinum, og her má heimaliðið metast sum risa stórur favorittur. StÍF hevur higartil tapt báðar sínar dystir í landskappingini, og einki er at ivast í, at meistaraliðið hjá VÍF verður ein dekan ov stórur biti hjá strandingunum.

Hjá monnunum eru vestmenningar somuleiðis favorittar, men hinvegin skal møguleikin fyri einum óvæntaðum úrslitið ikki heilt útilokast her. Flestum kunnugt, so megnaði StÍF at koppa meistarunum í steypafinaluni í fjør, og eisini eydnaðist hetta ta einu ferðina í landskappingini. Bæði liðini hava verið fyri onkrum broytingum hetta kappingarárið, men tað tykist, sum um tað serliga eru vestmenningar, sum hava merkt frágongdina, og verður dysturin tí helst ein góð ábending um, hvussu væl meistararnir eru fyri hetta kappingarárið.

Tveir í Havn

Í Havn verða somuleiðis tveir dystir leiktir mikukvøldið.

Uppi á Nabb spæla mansliðini hjá H71 og Kyndli, og lítið er at ivast í, at talan her verður um ein spennandi dyst. Hoyvíkingar hava veruliga gjørt seg til hetta kappingarárið, og ivaleyst miða teir eftir einum sessi uppi millum heiðursmerkini. Kyndil prógvaði tó sunnudagin, at hóast stóra frágongd, so eigur liðið at takast í álvara, og tí skulu teir í árstalsfelagnum als ikki roknað við nøkrum løttum dysti.

Í Gundadalshøllini verður dystur millum kvinnuliðini hjá Neistanum og Stjørnuni. Hesin dystur skuldi upprunaliga verið leiktur hóskvøldið, men hann er nú framskundaður, og er hetta eisini orsøkin til, at spælt verður í Gundadalshøllini. Talan er um tvey av teimum liðum, sum rokna við einum heiðursmerkjaplássi í ár, og vanliga hava dystirnir millum feløgini verið sera tættir, so alt bendir á, at talan eisini her verður um ein spennandi dyst.

Dystirni mikukvøldið eru hesir
1. deild kvinnur
18.30 Vestmanna
VÍF-StÍF
18.15 Gundadalsh.
Neistin-Stjørnan

1. deild menn
19.00 Nabb
H71-Kyndil
19.45 Vestmanna
VÍF-H71

LÝSINGARTORGIÐ

Lýsingatreytir fyri ókeypis lýsingar:
privatar lýsingar
í mesta lagi 40 orð
bert ein lutur í hvørjari lýsing
hægsta søluvirði 20.000 kr.

Lýsingar, gjaldast skal fyri:
Vanl. lýsingaprísur:
frá fyritøkum og virkjum
fleiri enn 40 orð
søluvirði, ið Sosialurin metir oman fyri 20.000 kr.

tó minst 70,- kr. við MVG hvørja ferð:
Lýsingar, gjaldast skal fyri:
70,- kr. við MVG hvørja ferð:
lýsingar undir teigunum:
»Dansur«, »Fundir« og »Matur« Bill. merktar

Akfør

VW GOLF
árg. 88, til sølu.
Tlf. 441536 - 217333

HVÍTUR BMW 525 TDS
árg. 92, koyrt 90.000 km, sóltak, ABS bremsur, fartpilot, cd-boks og sportsfelgur til sølu fyri hóskandi boð.
Tlf. 214321

CITROËN XARA
1,8 VTS, 130 HK, anlegg kann fylgja við, til sølu fyri 120.000 kr. Vetrardekk fylgja við. Ikki er roykt í bilinum.
Tlf. 251090

VW GOLF T.D.
árg. 87, til sølu.
Tlf. 212244 - 312244

FÝRA FELGUR
155x13, til sølu fyri 800 kr. Onnur tøl: 10-83. 4 1/2 JX13 4062 A.
Tlf. 448097 - 253867

TRÝ PÍKADEKK
Colway 175/70 R 14, til sølu fyri 300 kr. stk.
Tlf. 448097 - 253867

NISSAN SUNNY 1,4 GL
diesel, árg. 86, sýnaður í ár, til sølu fyri 5.000 kr.
Tlf. 255551

FORD ESCORT 1,3
st. car, árg. 87, til sølu. Hevur ikki nummarplátur.
Tlf. 255754

OPEL ASCONA
árg.87, til sølu.
Tlf. 447342

VOLVO 240
árg. 87, til sølu fyri 20.000 kr. Sýnaður í 2001, nýlakeraður.
Tlf. 318071

HONDA ACCORD 2,0 EXI
Árg. 87, el-rútar, 15" sportsfelgur við nýggjum dekkum, senkaður og nógvir eykalur fylgja við, bíliga til sølu.
Tlf. 252623

BMW 320i
árg. 86, koyrt 170.000 km, hevur sóltak, sportfelgur, til sølu um hóskandi boð fæst. Bilurin er í góðum standi.
Tlf. 218381

HONDA ACCORD 2.0
árg. 8/86, aut. gear, sóltak til sølu fyri 20.000 kr. 4 píkadekk fylgja við.
Tlf. 441964

PHILIPS CD-SPÆLARI
til bil til sølu fyri 1800, við hátalarum 2000 kr.
Tlf. 448210 eftir kl. 17

TOYOTA CARINA
árg. 87 til sølu fyri 15.000,-
Tlf. 449920 ella 212201

FELGUR
Fýra felgur til Rover 200 til sølu fyri kr. 1.600,- Nýprísur 2.600,-
Tlf. 316817 ella 250868

EYKALUTIR
til Toyota HiAce Diesel, árg. 90-95 til sølu.
Tlf. 227922

OPEL OMEGA 1,9
árg. 90, í góðum standi, til sølu.
Tlf. 424469

FORD ESCORT 1.6
árg. 91, vínreyður, í góðum standi til sølu fyri 18.000 kr.
Tlf. 310778 eftir kl. 18

FELGUR
17" felgur við dekkum til sølu, passa til Toyota o.a.
Tlf. 210346

OPEL VECTRA
diesel sedan, árg. 92, nýsýnaður, vetrardekk. Hyundai Elantra 1.5 GLI, árg. 92, nýsýnaður, incl. píkadekk og disk v/ CD-box. Mercedes Benz 300TD, 7 setur, árg. 84, nýsýnaður, incl. píkadekk, sóltak, krók, lakeraður í 2000.
Tlf. 317865 ella 224910

4 PÍKADEKK
Lítið brúkt píkadekk, 175/65-14, til sølu fyri 1.500 kr.
Tlf. 251761

4 BRÚKT PÍKADEKK
á felgum, til sølu fyri 500 kr. Stødd 165/13.
Tlf. 315554 / 216654

SPORTSFELGUR VIÐ DEKKUM
av merkinum Alavini STR 205/40/16, 4 hol, passa m.a. til Toyota, einans koyrt 5.000 km, til sølu fyri 7.500 kr. Nýprísur 11.000 kr.
Tlf. 211960

TIL SØLU
Ein Subaru st. car GL, 1,8 FWD frá nov. 87, til sølu. Skal sýnast í oktober vegna rust. Bilurin er mekaniskt í finasta standi og verður seldur sum hann stendur. Prísuppskot 12–15.000 kr.
Tlf. 316198, e. kl. 16

SUZUKI SJ 413
JX Jeepur við skaða framman, uttan plátur, bíliga til sølu sum eykalutir. Deilir kunnu eisini keypast í leysum. 4 felgur við dekkum hoyra til.
Tlf. 254741 - Best áðrenn kl.17

BILUR TIL SØLU
Ford Escort 1,6, nýsýnaður, árg. 91, í góðum standi. Kom og skoða bilin og gev eitt boð.
Tlf. 224560

OPEL CORSA SPORT
árg. 95, senkaður, sportsfelgur, spoilara allan vegin runt, dup. útstoyt og stórt musikkanlegg, til sølu.
Tlf. 313238

HYUNDAI SONATA 2000
2 ára gamal, til sølu fyri 135–140.000 kr.
Tlf. 361159 - 211159

NISSAN SUNNY 1,6 GTI
frá 87, koyrt 167.000 km, til sølu fyri 7.000 kr.
Tlf. 251288

FORD TRANSIT
diesel við trælast og dup. kabinu, til sølu. Bilurin er frá 94 og í góðum standi. Varð sýnaður 29.3.01.
Tlf. 226817

4 VETRARDEKK
á felgum, lítið brúkt, til sølu fyri 1.200 kr.
Tlf. 321820

TOYOTA COROLLA 1,3 GL
árg. 9/87, nýsýnaður, ongan kross, 137.000 km, reyður. Sera vælhildin. Til sølu.
Tlf. 254535

PÍKADEKK
Fýra nýggj píkadekk á felgum til sølu fyri 3500 kr.
Tlf. 448990

MAZDA 323
Nýliga sýnaður, einans koyrt 66.000 km, til sølu fyri 8.500 kr.
Tlf. 250826

HONDA ACCORD 2,0
árg. 86, til sølu til hægstbjóðandi yvir 10.000 kr.
Tlf. 211235

Amboð

TIL SØLU
Dreyibonkur við jørnum, 1.000 kr. ELU-sag TGS-173, 8.000 kr., nýprísur 13.000 kr.
Tlf. 456976, kl. 8-16

Arbeiði

ARBEIÐI SØKIST
Tilkomin maður søkir eftir arbeiði. Er útbúgvin sveisari. Skriva til:
Sosialurin,
Box 76,
110 Tórshavn,
Bill. mrk. 092

REINGERÐ
Sóknast verður eftir tilkomnum fólki at gera reint eina ferð um vikuna.
Anette Wang, tlf. 312257

ARBEIÐI YNSKIST
16 ára gamal drongur søkir arbeiði í Havn ella nærhendis eftir skúlatíð og í vikuskiftum.
Tlf. 250323

FRÁ SKÓTABÚÐINI
Skótabúðin søkir eftir leiðara hálva tíð. Kunnleiki innan teldu krevst. Skrivlig umsókn skal sendast til Skótabúðina, Hoydalsvegur 6,
100 Tórshavn

ARBEIÐI YNSKIST
Vit eru tvær gentur, ið søkja eftir arbeiði sum barnagentur og annað húsligt arbeiði.
Tlf. 255463 - 256734

Barnaútgerð

BRIO TVÍVOGNUR
Myrkabláur kombi tvívognur við selum, posum, lyftum, flugineti og regnverju til sølu fyri 3.000 kr.
Tlf. 310722, e. kl. 17

TIL SØLU
Sera væl viðfarin bláur barnavognur frá Skemmuni við regnskjóli og fluguneti til sølu fyri 1.000 kr.
Tlf. 256050

BARNAVOGNUR
Myrkabláur Brio barnavognur til sølu fyri 1.700,-
Tlf. 457292

BRIO BARNAVOGNUR
Svartur Brio-barnavognur við puslitasku og fluguneti til sølu. Sær út sum nýggjur, bert brúktur til eitt barn.
Tlf. 448964 ella 255323

TIL SØLU
Svartur barnavognur við gráum mattum stelli, lítið brúktur (bert 1 barn) v/lyft og puslikasku. Prísur 3.000,-
Tlf. 318458 ella 311209

SIMO BARNAVOGNUR
til sølu fyri 1.600 kr. Vognurin er myrkabláur v/ ternutum mynstri og hvítum hjólum. Sera væl hildin.
Tlf. 457550

BRIO BARNAVOGNUR
við lift, bert brúkt til eitt barn, til sølu fyri 3.000 kr.
Tlf. 319600 ella 216783

5 BABYLIFTIR
(óbrúktar), til sølu fyri 175 kr. stk.
Tlf. 316036 - 220272

Bátaútgerð

8-MANNAFAR
við nýggjum VHF, lensipumpu og øðrum til sølu. Hevur ikki fiskiloyvi.
Tlf. 251588

20 TONSARI TIL SØLU
20 tonsari til sølu – uttan fiskiloyvi.
Tlf. 219095

BÁTUR TIL SØLU
29 fót føroyskur bátur við 10 hk Volvo motori. Bátur og alt í honum er, er í góðum standi. Fiskiloyvi fylgir við.
Tlf. 226817

SÓMI 900 TIL SØLU
Byggiár 1988, 2x200 hk, Volvo diesel, nógv útgerð fylgir við. Myndir og spesifikatión pr. e-mail. Áhugað ringi
Tlf. 213536

Bingo

BINGO Í SKÁLAVÍK
Bingo verður í Skálavík hóskvøldið 18. okt. kl. 19.00. Lutaseðlar verða seldir.
Missiónshúsið

AB-STUÐLAR
skipa fyri bingo í Róðrarneystinum á Argjum hóskvøldið 18. okt. kl. 19.30. M.a. verða tvey lomb burturlutað og nógv annað gott verður at vinna.
Stuðlarnir hjá Argja Bóltfelag

GOTT BINGO
verður í Glæmuni í Kvívík týskvøldið 23. okt. kl. 19. Nógvir góðir vinningar. Full pláta 300 kr. Øll eru hjartaliga vælkomin.
Glæman

STÓRT TOMBOLA
hjá H71 stuðlum og Grønir dagar á Torginum í SMS. Friggjadagin 19. og leygardagin 20. okt. skipar stuðlafelagið hjá H71 fyri stórum tombola við nógvum góðum vinningum. Kl. 11 og kl. 14 friggjadagin og kl. 13 leygardagin sigur Finnbogi Joensen frá umhvørvismál og hjúnini Bláhamar sýna fram ENJO reingerðaramboð og klútar, ið gera reint uttan sápu.
H71 stuðlar

BINGO
verður í Felagslonini í Fuglafirði leygardagin 20. okt. kl. 16.00.
Eldrafelagið Borgin

GOTT BINGO
verður í Høllini mánadagin 29. okt. kl. 19.00. Annaðhvørt bingo 1/2 før. krov ella 300 kr. Á lutaseðli skerpikjøt o.a. Eykaspæl verður eisini.
Suðuroyar Norðara Dansifelag

Bøkur

BÓKASØLA
í Tilhaldinum í Tórsgøtu 21. Opið kl. 10–17. Fyll í ein lítlan posa av bókum fyri 10,- kr. og ein stóran fyri 20,- kr.
Tlf. 316491

Burturm. /funnið

BROSJA FUNNIN
uttan fyri Bygdarhúsið í Leirvík eftir ervið hjá Honnu Eliasen.
Tlf. 443164

BURTURMIST
Eftir 3. deildardystin í Vági 22. sept. misti eg mína »Copenhagen Tivoli Cop« T-shirt. Veit nakar um hana? Hon hevur persónligt virði fyri meg. Ring 371238,
Allan

ARMBAND FUNNIÐ
Silvur armband funnið á Landavegnum. Eigarin kann ringja
tlf. 312322

BURTURMIST
Tann, ið av misgáum tók mín svarta leðurjakka í høllini á Kambsdali 29. sept., verður biðin um at lata hann aftur. Í lummanum var eitt »konto-in« kort.
Tlf. 448536

MANNFÓLKAJAKKI
hekk eftir í Bygdarhúsinum í Kollafirði, tá føroyskur dansur var 29. sept. Er tað tín, so ring til
Tlf. 421086

SVARTIR FILA-SKÓGVAR
TÚ sum av »misgáum« hevur tikið mínar svørtu Fila-skógvar str. 38 í svimjihøllini (hjá gentunum) tann 8. okt. kl. 17.00 – vinarliga set teir aftur ella ring
Tlf. 315057

Býli

ÍBÚÐ YNSKIST
Ungur maður við føstum arbeiði ynskir íbúð til leigu í Havn, Argjum ella Hoyvík. Eri friðarligur og royki ikki.
Tlf. 224546

ÍBÚÐ YNSKIST Í HAVN
Vit eru eitt ungt par, ið eru í íbúðarneyð. Vit eru friðarlig og fara væl um. Vit bæði hava fast starv. Tað vildi glett okkum, um tit kundu hjálpt okkum. Vinarliga ring
Tlf. 225210, e. kl. 17

ÍBÚÐ YNSKIST
til leigu í Havn ella nærhendis, til trúgvandi fólk. Má hava 2-3 kømur.
Tlf. 260440 - 226629

GRUNDSTYKKI
í Toftalið í Vági til sølu. Sera gott útsýni.
Tlf. 315194

KAMAR TIL LEIGU
Felags køkur, stova og baðiverilsi + vaskimaskina.
Tlf. 213571

ÍBÚÐARNEYÐ!
Ungt par við einum barni, søkir íbúð í Tórshavn ella nærhendis skjótast gjørligt, av tí at íbúðin, ið vit búgva í verður seld síðst í okt. Gjalda til tíðina.
Tlf.: 319023/252164

LÍTIL ÍBÚÐ YNSKIST
Ung lesandi genta søkir lítla íbúð í suður Eysturoy. Hvørki drekki ella royki.
Tlf. 254250 e. kl. 17

KAMAR TIL LEIGU
í Vesturbýnum við atgongd til køk og bað.
Tlf. 221158 ella 313799

ÍBÚÐ YNSKIST
til leigu í Havn skjótast gjørligt til ungt par. Vit eru ábyrgdarfull, fara væl um og gjalda til tíðina. Vinarliga hjálpið okkum.
Tlf. 222436 - 253157

KEYPMANNAHAVN
Møblerað 2-ver. íbúð í Keypmannahavn (Amager) til leigu frá 15. nov. 2001 til 7. januar 2002 – møguliga longri.
Tlf. 0045 32848316 ella 361366

ÍBÚÐ TIL LEIGU
frá 1. november. Íbúðin er 90 kvm. stór, og er nær miðbýnum í Tórshavn. Leigugjald: 5.500 kr. um mánaðin umframt el og olju. Skriva til:
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn
Bill. mrk. 1195-1

HÚS Á SANDI
til leigu frá 1.11.2001.
Tlf. 316369

Lýsingartekstur

Lýsingin ynskist: 1 2 3 4 5 ferðir
(set X) undir teiginum:

❑ Akfør ❑ Amboð ❑ Arbeiði
❑ Barnaansing ❑ Barnaútgerð ❑ Bátaútgerð
❑ Bingo ❑ Brævaskifti ❑ Burturm./funnið
❑ Býli ❑ Bøkur ❑ Dansur
❑ Dýr ❑ Fundir ❑ Húsarhaldstól
❑ Innbúgv ❑ Lutaseðlar ❑ Leikur
❑ Matur ❑ Pløgg ❑ Samband
❑ Súklur ❑ Teldur ❑ Tónleikur
❑ Út-& sjónvarp ❑ Ymiskt ❑ .....

Lýsingarnar skulu vera okkum í hendi innan kl. 12⁰⁰, t.v.s. at lýsing til leygardagsblaðið skal vera okkum í hendi hósdag á middegi. Lýsingarnar, ið gjaldast skal fyri, koma ikki í blaðið fyrrenn tær eru goldnar.

Sent hevur:
Navn:……..
Bústaður:……
Bygd/býur:……
Tlf.: ……...

»Lýsingartorgið«
Sosialurin
Box 76
110 Tórshavn

Til frímerki